# Har ein skriða er lopin …



*Soleiðis og ivaleyst nógv verri, verða parkeringsviðurskiftini í Vágum, tá undirsjóvartunnilin letur upp, og eingi nýggj parkeringpláss verða gjørd*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Um somu tíð sum tað fréttist, at Vágatunnilin verður seinkaður, er eisini greitt, at parkeringsplássini við flogvøllin verða ikki gjørd í ár. Og á fíggjarlógaruppskotin um fyri næsta ár er eingin játtan**

PARKERINGSPLÁSS
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Parkeringsplássini, sum gerast skuldu við flogvøllin, verða ikki gjørd í ár. Játtanin fellur aftur í landskassan, og eingin játtan er á komandi fíggjarlógaruppskoti.

Kristian Rasmussen, sum fyri Landsverkfrøðingin hevur umsitið málið um parkeringsplásisni, sigur, at nú er so nógv liðið av árinum, og eingin endalig verkætlan fyriliggur, so staðfest er, at tað verður ov seint at fara undir arbeiðið, um tað skal vera liðugt á nýggjárinum. Tað er ikki realistiskt at vænta tað, sigur hann.

Tær fimm miliónirnar, sum játtðar vórðu til arbeiðið, falla sostatt aftur í landskassan.

Kristian Rasmussen sigur, at grundin til hesa støðuna er tann, at játtanin kom ov seint. Tað hevur stutt sagt ikki verið tíð at gjørt arbeiðið, sigur hann.

Arbeiðið varð boðið út í eini sonevndari totalenterprisu, har tann, sum fekk arbeiðið, eisini skuldi gera eitt projekt, sum friðingarmyndugleikarnir skuldu hava at geva síni loyvi eftir.

Tað projektið er ongantíð komið, og nú er ov stutt tíð at fáa fyrst góðkenning frá friðingarnevndini og síðan gera arbeiðið, áðrenn játtanin dettur burtur.

– Vit høvdu gjørt av, hvør skuldi gera arbeiðið, men her gjørdist einki, sigur Kristian Rasmussen.

Hvussu vorðið verður næsta ár, ber ikki til at siga, heldur Kristian Rasmussen. Einasta hann kann staðfesta í dag er, at á tí uppskoti til fíggjarlóg, sum liggur í Løgtinginum, er eingin króna sett av til ger av pakeringsplássum við flogvøllin.

Um tað kortini fer at bera til at »manøvrera« tað soleiðis, at pengar fáast, kunnu vit bara bíða eftir, sigur hann.

Borgarstjórin í Sørvági, Eivin Jacobsen, sigur, at har var ov illa avstafarið, at nú eingi parkeringspláss verða gjørd, hóast tað ikki var annað væntandi, tí so seint varð byrjað.

– Teir hava vitað leingi hjá landsverkfrøðinginum, at undirsjóvartunnilin fór at koma, og við honu eisini ein øgilig ferðsla. Tí er tað beinleiðis sløsarí, at ikki er farið undir hetta fyrr, sigur borgarstjórin í Sørvági.

– Eg kann bara staðfesta, at tað eru ikki vit her vesturi, sum hava skapt handan trupulleikan, men tað verða vit, sum fáa hann, tá bilar fara at standa parkeraðir um alla oynna, tí fólk ikki sleppa av við teir við flogvøllin, sigur Eivin Jacobsen.






# Forvitnislig heystframsýning í Orkis



*- Á heystframsýningini, sum verður opin í eina viku til 10 dagar, sýna vit fram okkara nýggjastu vørur, sigur Anette Sonne, sum her er avmyndað í hugnaliga kjallaranum í Orkis.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í kjallaranum í Orkis er í hesum døgum framsýning við gomlum og nýggjum, hvørt um annað. Her fært tú hugskot um, hvussu tú t.d. kanst skipa ein hugnaligan krók í stovuni ella aðrastaðni í húsinum við møblum, hillum, lampum, vasum, myndum og ymiskum blómum.**
**- Alt er til sølu, men málið við framsýningini er í fyrsta lagi at geva fólki ymisk hugskot, sigur Anette Sonne**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*

Í dag lata Sámal Erik Djurhuus og Anette Sonne, sum hava blómuhandilin, Orkis á Glyvrum, upp framsýning í kjallaranum í handilshølunum. Hetta er ein forvitnislig og áhugaverd framsýning, har tú sært stóra úrvalið av teimum vørum, handilin selir og tey mongu hugskotini, sum Orkis borðreiðir við. Hugflogið er stórt, og vørurnar fjølbroyttar. Hetta eru serliga nýggjar heystvørur og heystlitir, sum tey rópa tað.

Orkis er ein blómuhandil, sum hevur út við 20 ár á baki. Handilin hevur lagt seg eftir at fylgja "mótanum" og árstíðunum, bæði við sniðum og litum.

Men Orkis er meira enn ein nógv eftirspurdur blómuhandil. Har fært tú eisini alskyns vasar og pottar, bæði stórar og smáar, tú fært lampur, hillar, myndir í rammu og innbúgv av ymiskum slagi, umframt mangt annað, sum torført er at seta røttu orðini á.

Framsýningin er skipað saman við klædnahandlinum, Shop-In, sum er í sama bygningi. Í hugnaliga kjallaranum standa "dukkur" í klæðum, sum Shop-In selir, og hetta eru mótaklæði við rætta sniðinum og litunum, sum er frammi í dag.

- Hetta er ikki ein jólaframsýning, tí hon byrjar umleið hálvan november, men vit kunnu siga, at hetta er ein "forsmakkur" í so máta, sigur Sámal Erik Djurhuus.

## Hugskot

Anette Sonne sigur, at framsýningin er líka sum ætlað fólki, ið leita sær eftir hugskotum og samansetingum av ymiskum slagi.

Í kjallaranum er gamalt og nýtt, hvørt um annað, og her fært tú hugskot um, hvussu tú t.d. kanst skipa ein hugnaligan krók í stovuni ella aðrastaðni við møblum, hillum, lampum, vasum, myndum og blómum.

- Alt er til sølu, sum vit hava frammi, men málið við framsýningini er líka so nógv at geva fólki ymisk hugskot, sigur Anette.

Tá ið framsýningin letur upp í dag, verða eisini blómubindingar av ymiskum slagi at síggja.

Litirnir, sum eru nógv frammi í heyst, eru eitt nú brút, grønt, ráðhvítt og svart.

Framsýningin hjá Orkis varar eina viku til 10 dagar. Hesa vikuna verður opið í dag, hósdagin og fríggjadagin frá kl. 9-19 og leygardagin frá kl. 9-15. Sunnudagin verður eisini opið frá kl. 15-19. Orkis hevur ikki vanliga opið sunnudagar - uttan, tá ið okkurt serligt er á skránni og í desember, tá ið jólini nærkast.

## Pakkaloysnir

Orkis er ikki bara ein handil sum aðrir handlar, men tey taka sær eisini av at gera blómubindingar, borðpynt og annað til eitt nú veitslur, brúdleyp, føðingardagar og onnur høvi, tá ið fólk velja at gera meira burtur úr enn vanligt.

- Vit bjóða eisini viðskiftafólki "pakkaloysnir", har vit fara út at pynta og hava eitt nú blómur, stakar, dúkar og vasar við sjálvi, sigur Anette Sonne.

